# Skjalayvirlit til umsókn um **Matstovuloyvi**

Umsøkjari:

**1) Gistingarhúsvirksemi** ☐
**2) Matstovuvirksemi** ☐
**3) Kafévirksemi** ☐
**4) Diskoteksvirksemi** ☐
**5) Vertshúsvirksemi** ☐
**6) Mentanarligt virksemi** ☐

***Viðmerking: Set í minsta lagi ein kross í nr. 1-6***
*Skeinkiloyvi eru treytað av slag av virksemi, sum farið verður undir. Virksemi, nevnt í nr. 2-3, krevur løggilding frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Virksemi, nevnt í nr. 4-6, krevur skráseting á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.*

☐ **1. Umsókn um matstovuloyvi**
***Viðmerking:*** *Umsóknarblað fæst frá Loyvisnevndini*

**Saman við umsóknini skulu leggjast hesi skjøl:**

☐ **2. Avrit av dópsbrævi hjá umsøkjara og leiðara / ella avrit av passi, koyrikorti, navnabrævi**
***Viðmerking:*** *Umráðandi er, at originalurin ikki verður sendur inn.* ***GG:*** *Umsøkari og/ella leiðari skulu vera eldri enn 18 ár.*

☐ **3. Brunaváttan og umhvørvisváttan frá kommununi**
***Viðmerking:*** *Kommunan skal brunagóðkenna hølini. Partur av brunagóðkenningini er at áseta mest loyvda tal av gestum á staðnum. Kommunan skal eisini umhvørvisgóðkenna virksemi, t.e. at virksemið er í samsvari við galdandi umhvørvisreglur. Umsøkjarin skal sjálvur venda sær til kommununa fyri at fáa nevndu góðkenning og váttan.*

☐ **4. Løggildingarváttan ella skrásetingarskjal frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni**
***Viðmerking:*** *Er talan um virksemi, nevnt í nr. 2-3, skal virksemið løggildast av Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Er talan um virksemi, nevnt í nr. 4-6, skal virksemi skrásetast á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Umsøkjarin skal sjálvur venda sær til Heilsufrøðiligu starvsstovuna fyri at fáa annaðhvørt løggildingar- ella skrásetingarskjal. Er talan um endurnýggjan av matstovuloyvinum, skal Loyvisnevndin hava avrit av galdandi løggildingarskjali. Avrit fæst frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni.*